gult18 cyan18 magenta18 svart18

Bosch við EHB skipan

Bosch, sum er ein av heimsins leiðandi framleiðarum av framkomnari tøknifrøði til bilar, hevur gjørt nýggju EHB bremsuskipanina saman við DaimlerChrysler. Skipanin er langt frammanfyri ABS bremsurnar, og verður skjótt standard útgerð í flestu miðalklassabilum.

Kelda: Motor Magasinet

Volvo hægsta karakter

Týski bilfelagsskapurin ADAC, hevur testað verjuna ímóti koyrilsbresti "piskesmæld", á fleiri bilmerkjum. Volvo fekk hægsta karakter fyri setrini á V70 og S80.

Kelda: Bilen Motor & Sport

ÚT AT KOYRA

BMW Compact – fingið sín egna identitet

BMW Compact líkist nú ikki so nógv sedan modellinum, sum teir hava gjørt áður

BMW Compact, ið er tann stytra útgávan av 300-røðini við 3 hurðum, hevur nú fingið sín egna identitet. Mest sjónligu munirnir eru framman og aftan.

BILAR
Magnus Gunnarsson

Samstundis sum sum modellið er broytt, hevur Compact eisini fingið tann mest framkomna motorteknikkin, sum BMW kann bjóða fram í hesum klassanum. Talan er um Valvetronic skipanina við variablum knastaksli, sum regulerar innsúgvingarventilarnar, meðan trýst verður á spitaran. Fyrimunurin við hesi skipan er at bilurin brúkar minni brennievni, trekkjur betri og kraftar meira. At byrja við verður tað bert 316 sum fær hesa skipan, sum seinni kemur at verða brúkt í øllum motorunum hjá BMW.

Designbroytingar

Annars eru broytingarnar bæði uttan og innan. Lyktirnar farmman eru nú innbygdar hvør sær. Aftan eru eisini desingbroytingar, sum t.d. at baklyktirnar hava nú klárt lyktaglas uttaná. Alt hetta ger at BMW Compact nú ikki líkist sedan modellinum, so nógv sum teir hava gjørt áður. Innan eru fleiri broytingar, og setrini er í, eins og í teimum størru BMW bilunum.

Á baklyktunum er klárt lyktaglas uttaná lyktunum

Lyktirnar farmman eru innbygdar hvør sær. Sum eykaútgerð fæst bilurin við Xenon lyktum

Sølustevnan vendir sær úteftir

Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Tað var ein heldur errin Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum setti fiskivinnustevnuna í Runavík týsmorgunin og hann var errin vegna stigtakararnar og vegna føroyska vinnulívið, sum so dyggiliga hevur tikið undir við North Atlantic Fish Fair.

-Hetta er ikki ein sølustevna, sum vendir sær til føroyska keyparan. Hetta er ein sølustevna, har føroyingar og útlendingar á jøvnum føti vendir sær til brúkaran. segði Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Eg fari at takka stigtakarunum, at teir høvdu álit á vinnuni og eg fari at takka vinnuni fyri stuðulin, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður.

Í fagransta veðrivarð stevnan sett við hørnblástri og kórsangi og síðan fyltust sýningarhallirnar av teim vanligu messudreingjunum, sum vanliga eru at síggja á messum og einum forvitnum almenningi.

Anfinn Kallsberg, løgmaðureftir setanina á fiskivinnustevnuni í Runavík.

Mynd Jens Kr, Vang

Gólvsølan

Seks bátar seldu góð trý tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum mánadagin. Allir høvdu teir landað í Klaksvík

Sýslunummar	Skipanavn	Reiðskapur	kilo
KG 143	KALLANES	SNELLA	120
KG 452	BEINISSVØRÐ	SNELLA	139
KG 705	SONJA	SNELLA	222
KG 743	ELSA	SNELLA	105
KG 92	ØLDAN	SNELLA	41
KG 94	BRID FORD	SNELLA	319
TN 919	MORGUNRODIN	SNELLA	2.427

Vørunavn	kilo
HÝSA 2	3
HÝSA 3	4
HVÍTINGUR 0	2
LONGA 2	5
TOSKUR 1	49
TOSKUR 2	113
TOSKUR 3	1.250
TOSKUR 4	1.649
TOSKUR 5	270
UPSI 2	4
UPSI 4	24

Osmund Justinussen:

Imponeraður

Jústinus Leivsson
Eidergaard

-Eg eri heilt imponeraður. Eg hevði als ikki rokna við at síggja eina fiskivinnuframsýning á so høgum støði í Føroyum. Her er alt sum vinnan hevur brúk fyri. Her er lína, trol, motorar, nautisk útgerð og stutt sagt alt tú kann hugsa tær á eini slíkari stevnu.og onnur úrgerð. Hetta er stutt sagt óført, segði Osmund Justinussen, reiðari, tá vit hittu hann á fiskivinnumessuni.

Og hann helt seg sjálvsagt til stóra básin hjá P/F Vónini, sum er navnfrom í øllum norðuratlantshavi fyri dygdargóð trol. Osmund er fyrst og fremst trolarareiðari og hansara trolarar hava fiskað gylt seinastu árini undir Føroyum.

Osmund Justinussen, ein av okkara dugnaligu reiðarum, sum fylgir væl við hvar hendir innan fiskivinnuna.

Mynd Jens Kr, Vang

Á hædd við aðrar

FISKIVINNUSTEVNUR
Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Ein teirra sum alla tíðina fylgir við nýggjasta innan fiskivinnu er Kristian Martin Rasmussen úr Klaksvík,. Hann er reiðari á Chr. í Grótinum og Norðborg og hann er sjálvsagt mest áhugaður í hvat nýtt er at finna innan fiskireiðskap til uppisjógvafisk. Og Kristian Martin var ikki vónbrotin, tá hann var tilsetanina av fiskivinnustevnuni týsmorgunin.

-Hendan fiskivinnustevnan er á hædd við aðrar eg havi vitja úti í heimi og eg eri errin av henni, sigur Kristian Martin Rasmussen.